


## BÚSKAPARPOLITIKKURIN HJÁ NÝGGJU STJÓRNINI

Nýggja stjórnin hevur sett sær fyri, at fáa framt nøkur høvuðsmál í búskaparpolitikkinum. Nøkur av teimum eru:

Ísland skal verða skuldarfrítt innan 10 ár.
Stjórnin hevur sett sær fyri, at minka um skuldina og langtíðarmálið er, at Ísland skal verða leyst av almennari skuld innan tíggju ár. Hetta skal gerast við, at halda aftur í almennu útreiðslunum, fáa meira burturúr almennum innkeypi, økja um framleidni innan tað almenna og við privatisering.

Privatisering
Stjórnin ætlar at selja ognirnar, sum ríkiskassin mátti taka yvir eftir bankakrakkið í 2008, fyrst og fremst teir tríggjar bankarnar, sum máttu bjargast. Sum er, eigur stjórnin 98,9% av partabrøvunum í Landsbankanum, 100% av partabrøvunum í Íslandsbankanum (áður Glitnir Banka) og 13% av partabrøvunum í Arion Banka (áður Kaupthing Banka).

Sambært samgonguskjalinum verður sagt, at í longdini er tað ikki ætlanin at staturin skal hava meirilutan í bankunum. Tí er tað umráðandi at minka um ognarlutin hjá statinum í smáum stigum og við breiðari undirtøku.

> *» Serlig áherðsla vil verða løgd á at fáa eina opna og gjøgnumskygda tilgongd, og so stóra spjaðing í ognarrættinum, sum gjørligt. Við hesum í huga, skal málið vera, at almenningurin fær ein ávísan part av partabrøvunum ókeypis.«*

Stabilitets grunnur
Stjórnin ætlar at seta á stovn ein stabilitets grunn, sum skal stýra inntøkurnar frá orku stovnunum, sum landið eigur. Hetta fyri at tryggja, at framtíðar ættarlið fáa fyrimun av tilfeinginum og skal verða við til viga upp ímóti sveiggjunum í búskapinum.

Skatting
Skatting, sum eitt inntøkuskapandi amboð til felags útreiðslur, skal styrkjast, eins og skattainnkrevjingin. Skattaundandráttur, íroknað skattaskjól, vil miðvíst verða mótarbeitt. Eitt rættvíst skattaumhvørvi, minkar um tørvin á skattalækkingum og

## FUNDIR, TILTØK O.A. Í FEBRUAR:

**1. febr.** fund við FO-IS handilskamarið

**2. febr.** fund við ísl. Uttanríkisráðið

**3. febr.** móttøka í sendistovuni í samb. við handan av innsavningini til Landsbjargingarfelagið í FO

**4. febr.** móttøka hjá forseta Íslands

**9.** febr. luttaka í "Viðskiptaþing 2017" hjá ísl. arbeiðsgevarafelagnum

**9. febr.** jarðarferð hjá Eiður S. Guðnason, fyrrv. ísl. sendiharra í FO

**10. febr.** vitja Vígdís Finnbogadóttir og nýggja stovnin og bygningin.

**10. febr.** fund við forsetaskrivstovuna um forsetavitjanina í FO í mai.

**10. febr.** luttaka í móttøku hjá russiska sendiharranum

**16. febr.** vitja Iceland Ocean Cluster

undantøkum frá almennum gjøldum, sum vil økja um altjóða kappingarførið hjá fyritøkunum.

Skattaumstøðurnar fyri smáar og millumstórar fyritøkur skulu gerast einfaldari og lønarskatturin skal lækkast. Ein samansett skipan fyri grønar skattir, ið skatta virksemi, sum dálkar, verður sett í verk og sum samstundis skal eggja til at minka um útlátið.

Gjaldoyraviðurskifti
Nýggja stjórnin vil gera sítt til at minka sveiggið í gjaldoyrakursinum hjá tí íslendsku krónuni, ið hevur haft við sær óstabilitet og er ein av orsøkunum til, at rentustøðið í Íslandi vanliga er hægri enn í øðrum londum.

Penga- og gjaldoyrapolitikkurin skal endurskoðast í ljósinum av fíggjarligu støðuni, øktari ferðavinnu og gjaldoyragoymsluni. Kanningin skal leiðast av einari nevnd, mannað av ráðharrum og tekur støði í frágreiðingini, sum íslendski Seðlabankin gjørdi í 2012. Eftirmetingin skal meta um møguleikar, so sum inflasjónsmál, gjaldoyraráð, fastan gjaldoyra kurs o.a.

Kapitaleftirlitið
Í fjør samtykti Altingið eina lóg, sum var ein varði á vegnum til at taka av kapitaleftirltið, sum hevur verið í gildi síðan 2009. Nýggja stjórnin vil raðfesta framhald av ætlanini um at taka kapitaleftirlitið av. Verksetingin av tí búskaparliga politikkinum liggur fyrst og fremst í hondunum á nýliga tilnevnda fíggjarmálaráðharranum, Benedikt Jóhannesson og forsætisráðharranum, Bjarni Benediktsson, sum var fíggjarmálaráðharri í undanfarnu samgongu.

*Sí meira her (samgonguskjalið á enskum)*

## FORSETIN TEKUR ÍMÓTI FLÓTTAFÓLKUM Á BESSASTÖÐUM



*Mynd 1. Forseti Íslands, Guðni Th. Jóhannesson og forseta frúgvin Eliza Reid (t.v. fyri forsetan) taka ímóti flóttafólkum, sum júst eru komin til Íslands. Inni í húsinum bíða ráðharrin í flóttafólkamálum, Þorsteinn Víglundsson og borgarstjórin í Reykjavík, Dagur B.Eggertsson.*

Ísland hevur avgjørt at taka 5 sýriskar flóttafamiljur til Íslands. Familjurnar vórðu móttiknar av íslendska forsetanum, Guðni Th. Jóhannesson, í móttøkuhúsi hansara á Bessastøðum.
Guðni Th. Jóhannesson greiðir frá, at Ísland hevur ikki møguleika at taka ímóti øllum flóttafólkum, og tí er umráðandi, at tær sterku tjóðirnar arbeiða við at fáa frið í teimum økjunum, har kríggj er. Tað, vit kunnu gera er, at geva teimum familjum, ið eru komnar higar, tryggleika og eitt gott stað at búgva. Fyri at flóttafamiljurnar skulu gerast ein partur av íslendska samfelagnum, er eitt samstarv millum Reyða Kross í Íslandi, privatar fyritøkur og íslendskar familjur. Tá flóttafólkini koma til Íslands, er ein íslendsk familja til reiðar at taka ímóti teimum og hjálpa teimum í nakrar mánaðir, fyri at sameina tey í íslendska samfelagnum. Íslendska "familjan" hjálpir til við at gera íbúð teirra til reiðar, tá ið flóttafamiljurnar koma og at vitja tær regluliga. Tær hjálpa til við bæði stórum og smáum. Forsetin, Guðni Th. Jóhannesson, nevndi eisini at "*í Íslandi arbeiða vit fyri at verja mannarættindini, javnstøðu, framsøgufrælsi, trúarfrælsi og tryggleika.*"

*Sí meira her (á enskum)*




*Mynd 2. Bláu stabbarni eru føroyski vøruútflutningurin til Íslands. Sum tað sæst, so er útflutningurin til Íslands vaksin nógv seinastu tvey árini.*

## FØROYSKI ÚTFLUTNINGURIN TIL ÍSLANDS NÆSTAN TVÍFALDAÐUR SEINASTU 2 ÁRINI.

Í takt við at Ísland hevur fótað sær fíggjarliga, og at stórur búskaparvøkstur hevur verið seinastu árini, serliga grundað á, at ferðavinnan er vaksin so ómetaliga nógv, er keypiorkan vaksin samsvarandi. Kanska er tað meira tí, at í kreppuárunum hevur verið hildið nógv aftur við nýtslu og íløgum.
Sum tað sæst á myndini til vinstru, so er íslendski innflutningurin úr Føroyum (tað er tað sama sum føroyski útflutningurin til Íslands – bláu stabbarnir) vaksin nógv seinastu tvey árini. Útflutningurin hevur ongantíð, seinastu 12 árini, verið so stórur. Samstundis er íslendski útflutningurin til Føroya eisini vaksin, og hevur Ísland havt avlop á handilsjavnanum við Føroyar øll árini.
Uppgerðin er frá íslendsku hagstovuni og er í mió. ISK. Tølini frá Hagstovu Føroya fyri 2016 eru ikki tøk enn.




*Mynd 3. Føroyski útflutningurin av tænastum stendur seg væl. Bláu stabbarnir umboða Føroyar og reyðu Ísland*

## ÚTFLUTNINGURIN AV TÆNASTUM STENDUR SEG VÆL

Síðani 2009, tá ið uppgerðin av tænastum millum Føroyar og Ísland gjørdist tøk, hevur Føroyar so at siga havt avlop við tænastusamhandilin við Ísland. Talan er fyrst og fremst um tænastur innan flutning, telesamskifti, tryggingartænastu, kunningartøkni o.a.
Tølini stava frá Hagstofu Íslands og tølini fyri 2016 eru ikki tøk fyrr enn í mars mánaði ella so. Áhugavert er at síggja, at samhandilin á hesum øki er á einum rímiligum støði og hevur verið støðugur síðan 2012, tó undantikið 2014, tá ið føroyski útflutningurin gjørdi eitt lítið lop.

## FISKIMANNAVERKFALL Í ÍSLANDI STENDUR VIÐ Á 8. VIKU

Síðan 14. desember 2016, hevur tann íslendski fiskiflotin ligið stillur vegna verkfall.

Eingin sáttmáli hevur verið millum partarnar síðan 2011, og nú góðtók sjómannafelagið ikki støðuna longur. Ein orsøk til hetta kann vera, at íslendska krónan er styrkt nógv og bretska pundið er lækkað nógv. Bretland er ein týðandi partur fyri ta íslendsku fiskivinnuna. Hetta hevur við sær, at úrtøkan hjá bæði manning og reiðaríum er lækkað nógv, serliga av tí parti, sum verður selt til bretska marknaðin, sum er ein týðandi marknaður fyri íslendskar fiskavørur.



*Mynd 4. Skipini liggja, og einki arbeiði er á flakavirkjunum.*

Tað, sum trætan snýr seg um er, at:

- fáa sjómannafrádráttin inn aftur í skattaskipanina
- fáa broytt oljuútrokningar viðurskiftini
- fáa ókeypis mat
- fáa ókeypis arbeiðsklæðir
- fáa ókeypis fjarskifti

Sjómannafelagið ger krøvini upp til uml. 3 mia. ISK (~ 180 mió. DKK), meðan reiðarafelagið sigur at krøvini umboða uml. 4 mia. ISK (~240 mió. DKK). Ríkissemingsmaðurin er komin uppí og hevur havt fleiri fundir, og semingsuppskot eru vrakaði. Tað sær ikki út til, at ein loysn fæst í bræði.

Verkfallið er byrjað at seta djúp spor hjá havnarbygdunum uttanfyri Reykjavík. Tað eru áleið 1.600 fólk, ið ikki hava arbeitt í flakavirkjum og øðrum virkjum, sum eru knýtt at fiskivinnuni, meðan verkfallið er. Tey hava onga løn fingið í hesum tiðarbili. Inntøkurnar hjá kommununum eru minkaðar munandi, og higartil hevur t.d. Fjarðabyggð kommuna (Neskaupstaður, Eskifjörður, Reyðarfjörður, Fáskrúðsfjörður, Stóðvarfjörður, Mjóifjörður) mist 40% av inntøkuni, ið stavar frá fiskivinnuni. Í januar mánaði í fjør vórðu t.d. 17.000 tons landaði í Fjarðabyggð kommunu, og sama tíðarskeið í ár, vórðu einans landað 1.000 tons.

Nú eru tað einans einmans deksbátar og smærri før, ið fiska, og hesir smáu bátar klára als ikki at nøkta tí stóra eftirspurninginum, ið er eftir fiski í løtuni. Men hesir bátar fáa hinvegin sera góðan prís fyri teirra veiðu.

Reiðararnir óttast fyri, at tað verður trupult at koma inn aftur á marknaðin, nú aðrir seljarar hava tikið yvir á teimum marknaðum, sum Ísland seldi til undan verkfallinum. Politikararnir hava higartil avvíst, at leggja seg út í trætuna.

## HVUSSU ÍSLAND HEVUR BAST RÚSDREKKA MILLUM UNG




*Mynd 5. Yvirlit yvir gongdina av rúsevnisnýtslu hjá 10. flokkum í Íslandi. Sum tað sæst, so er alkohol nýtslan minkað úr 42% í 1998 niður í 5% í 2016 (grøna linjan). Roykingin er farin úr 23% niður í 3% í sama tíðarskeiði (reyð linja). Tó er rúsevnisnýtslan millum 9% og 7% í tíðarskeiðinum 2009 – 2016 (bláa linjan). Heimild: RUV*

Tey seinastu 20 árini er ein týðilig broyting gjørd innan rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu í Íslandi. Eitt samstarv millum foreldur, skúlar og landið, hevur verið ein liður í at minka um rúsdrekka- og rúsevnis misnýtsluna í Íslandi. Lógarbroytingar eru gjørdar soleiðis, at tað ikki er loyvt at lýsa við rúsdrekka, og aldursmarkið fyri at keypa rúsdrekka bleiv hækkað frá 18 ár upp í 20 ár.

Eisini kom ein nýggj skipan í gildi, ið forðaði børnum í aldrinum 13-16 ár at vera úti eftir klokkan 22.00 um veturin og klokkan 24.00 um summarið. Hendan skipan er enn galdandi og hevur riggað væl. Sum dømi kann nevnast, at ein 15 ára gamal føroyskur drongur, búsitandi í Íslandi, var farin í 16 ára føðingardag. Hesin føðingardagur skuldi enda klokkan 23:50, soleiðis at hann kundi náa at koma heim, áðrenn klokkan bleiv 24.00.

Hvørt ár verður ein kanning gjørd, ið samanber rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu hagtølini við undanfarnu ár. Tey 18 árini, hendan verkætlanin hevur virkað, er talið av 15-16 ára gomlum tannáringum, ið hava verið ávirkaðir av rúsdrekka undanfarna mánað, lækkað úr 42 prosentum í 1998, niður í 5 prosent í 2016. Samstundis er prosenttalið av roykjarum fallið við 20 prosent-stigum, frá 23 prosentum í 1998 niður í 3 prosent í 2016.

*Sí meira her (á enskum)*

## ÍSLENDSKA SJÓVERJAN KEYPIR OLJU Í FØROYUM



*Mynd 6. Íslendsku sjóverjuskipini við bryggju.*

Íslendska sjóverjan, Landhelgisgæslan, hevur seinastu trý árini keypt olju í Føroyum fyri knappar 247 mió. ISK (~14 mió. DKK). Hesi trý árini, hava verjuskipini verið níggju ferðir í Føroyum og tey hava keypt knappar 3,8 mió. litrar av olju. Íslendska sjóverjan ræður yvir trimum skipum (Þór, Týr og Ægir).

Íslendsku verjuskipini hava seinastu árini verið støðugt minni úti. Í 2006 vóru tey úti í meira enn 600 dagar, men bert 303 dagar í fjør, so sigast kann, at íslendska sjóøkið var uttan sjóverju í tveir mánaðir.

Høvuðsorsøkin til, at tann íslendska sjóverjan hevur verið í Føroyum og bunkrað olju er fyrst og fremst tann, at sjóverjan sleppur undan at rinda mvg. Harnæst er oljan bíligari í Føroyum enn í Íslandi. Í Íslandi er mvg'ið ein partur av játtanini til stovnarnar.

Hetta er ein góður háttur at fáa avmarkaðu játtanina til at røkka longur.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook